## Nýggj ferðavinnudeild stovnað

Uttanríkisráðið hevur til tess at raðfesta ferðavinnu valt at seta á stovn deild, ið burturav skal arbeiða til frama fyri ferðavinnuna. Deildin hevur fingið navnið Deildin fyri ferðavinnu, og í altjóða høpi VisitFaroeIslands. Uttanríkisráðið sigur, at høvuðsuppgávan hjá deildini verður at menna og marknaðarføra Føroyar sum ferðaland í tøttum samstarvi við nýstovnaða ferðavinnufelagið og vinnuna annars. Nýggja deildin er farin til verka at fáa til vega hagtøl um ferðavinnuna sum vinnugrein og at gera eina virksemisætlan fyri marknaðarføring av Føroyum sum ferðamál. Ætlanin fer at gerast grundarlag undir arbeiðinum og raðfestingunum hjá Deildini fyri ferðavinnu tað sum eftir er av 2009 og í 2010. Stjóri á nýggju ferðavinnudeildini er Súsanna Sørensen. - Ferðavinnan er heimsins størsta vinna. Vit hava eitt vakurt land og áhugavert mentanarlív. Nú skal eitt miðvíst arbeiði gerast at marknaðarføra og menna føroysku ferðavinnuna. Tí er at fegnast um, at Deildin fyri ferðavinnu arbeiðir tætt saman við Ferðavinnufelagnum og øðrum um at gera eina slíka ætlan fyri marknaðarføring av Føroyum sum ferðalan, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.



# Kenny Rogers kemur ikki

**Ongin konsert verður við Kenny Rogers í Føroyum. Fyriskipararnir av konsertunum er ikki at finna, men Dánjal Samuelsen, hallarleiðari í høllini á Hálsi, har konsertirnar skuldu verða, váttar, at alt er avlýst. – Ja, høllin er ikki longur umbiðin. Eg fekk ein mail frá fyriskiparunum í Onglandi í morgun, har eg fekk at vita, at konsertirnar eru endaliga avlýstar, staðfestir hann. Ensku agentarnir harmast**




*Stóra stjørnan kemur ikki til Føroya í ár. Tað er nú endaliga staðfest. Júst hvat gekk galið, veit framvegis ongin*

*Tilgjørd mynd*

AVLÝST

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í longri tíð hevur tos verið at hoyrt um at Kenny Rogers hóast alt ikki kemur til Føroya. Ætlanin var frá fyrstan tíð, at konsertir skuldu vera við heimskenda kontrinavninum í aprílmánaði, men so komu boð, at hetta var útsett, og at aðrir fyriskiparar skuldu vera.

Ætlandi skuldu tvær konsertir vera 17. og 18. septembur, men nú kann Sosialurin avdúka, at føroyskir fjepparar kortini ikki sleppa til konsert hjá Kenny Rogers.

Sosialurin hevur seinastu tíðina roynt at fáa fatur á fyriskiparunum av ætlaðu konsertunum, men teir hava verið sum at finna flogvallir á Slættaratindi.

Tí setti blaðið seg í samband við Dánjal Samuelsen, hallarleiðara í høllini á Hálsi, og hann váttar keðiligu tíðindini.

– Ja, høllin er ikki longur umbiðin. Eg fekk ein mail frá fyriskiparunum í Onglandi í morgun, har eg fekk at vita, at konsertin er avlýst, staðfestir Dánjal Samuelsen.

### Farnir undir jørð

Sosialurin hevur í longri tíð roynt at fáa fatur á umboðum fyri Sp/F Holmen, sum á planet.fo tann 23. februar, staðfestu, at Kenny Rogers kortini skuldi koma til Føroyar, og at Sf/Holmen somuleiðis hevði fingið ábyrgdina av konsertum hansara í Norðurlondum seinni í septembur.

– Vit hava leingi vitað, at føroyingum dáma ótrúliga væl Kenny Rogers, og tí hava vit nú tikið stig til, at geva føroyingum hesa upplivingina, segði Benny við Sandá, við Planet 23. februar.

Hetta verður í hvussu so er av ongum.

– Teir úr Onglandi hava fleiri ferðir spurt eftir nummurunum hjá teimum, sum skuldu skipa fyri, men onglendingarnir hava ikki fingið fatur á føroyingunum, staðfestir Dánjal Samuelsen, tá hann verður spurdur.

### Aðrir í myndini

Sum skilst hevur tað eisini verið soleiðis, at ensku agentarnir hjá Kenny Rogers hava roynt at fáa aðrar fyriskiparar til konsertirnar hjá Kenny Rogers í Føroyum. Men hesir hava allir borið seg undan.

Áðrenn 23. februar skiltist tó, at nógv feløg høvdu áhuga fyri at fáa Kenny Rogers til Føroya, men nú er hesin áhugin burtur.

### Agentur harmast

Agenturin hjá Kenny Rogers í Onglandi harmast, at ongar konsertir verða, og staðfesta somuleiðis, at fólk mugu gera tað tey kunnu, fyri at fara aftur við atgongumerkjunum og krevja pengingin aftur.

Hann vísir eisini á, at tað enn ikki er greitt, júst hvat gekk galið, men at ein almenn útsøgn kemur seinni.

### Nógvur mistur peningur

Sum skilst var talan um rættiliga nógvan pening, sum Sp/F Holmen skuldi rinda fyri konsertirnar við Kenny Rogers. Talan er um eitt tal, ið táttar í fimm milliónir krónur.

Sum skilst hevur Sp/F Holmen rindað ein part av hesum peningi, og tann peningin fær felagið ikki aftur.

Hinvegin skilst eisini, at í samband við konsertirnar í Danmark skuldu danir skipa fyri marknaðarføringini, men har er ongin gjørt.

Tí kunnu vit ganga útfrá, at Sp/F Holmen hevur mist nógvan pening av ætlaðu konsertunum. Men hetta ber ikki til at staðfesta, tí onki umboð fyri Sp/F Holmen hevur verið at hitta.

### Selja ikki atgongumerki

Á almennu heimasíðuni stendur framvegis, at konsertir verða við Kenny Rogers í Føroyum í septembur-mánaði, men í mun til flestu konsertirnar, sum Kenny Rogers stendur at hava, er ikki møguleiki at keypa atgongumerki til konsertirnar í Føroyum, og støðan er tann sama við einari konsert í Danmark.

Hinvegin ber til at keypa atgongumerki til aðrar konsertir í Danmark, so tað kann hugsast, at Sp/F Holmen ikki longur hevur ábyrgdina av hesum konsertum, sum umboð annars greiddi Planetini frá í februarmánaði.

### Konsertskráin hjá Kenny Rogers í Septembur

**Woodstock, VA**
September 04, 2009 7:30 p.m.
Shenandoah County Fair
**Buy Tickets**

**Gatineau, QC, Canada**
September 05, 2009
Gatineau Hot Air Balloon Festival
**Buy Tickets**

**Gstaad, Switzerland**
September 11, 2009
Gstaad Festival
**Buy Tickets**

**Gstaad, Switzerland**
September 12, 2009
Gstaad Festival
**Buy Tickets**

**Aalborg, Denmark**
September 14, 2009 9:30 p.m.
Gigantium
**Buy Tickets**

**Copenhagen, Denmark**
September 15, 2009 9:30 p.m.
Valby-Hallen

**Torshavn, Faroe Islands**
September 17, 2009 9:30 p.m.
Sportshall

**Torshavn, Faroe Islands**
September 18, 2009 9:30 p.m.
Sportshall

**Bergen, Norway**
September 20, 2009 9:30 p.m.
Grieghallen
**Buy Tickets**

**Snoqualmie, WA**
October 01, 2009 8:00 p.m.
Snoqualmie Casino
**Buy Tickets**

Sum sæst, ber til at keypa atgongumerkir til allar konsertirnar uttan tí í Keypmannahavn og til tær báðar í Føroyum beinleiðis av netinum.

*Kelda: kennyrogers.musiccitynetworks.com*